**SPAR 1.000 KR.**
um tú teknar teg áðrenn 1. oktober 2010

2 dagar við brennideplinum á

# Innanhýsis húsavørðin

- faklig og persónlig menning til tín, sum arbeiðir við professionellum viðlíkahaldi og tænastu av fastognum

- Fá samstarvið við hini í fyritøkuni at virka á besta hátt
- Arbeið meira effektivt við telduni – prei, snildir og snarvegir
- Soleiðis mennir tú teg í leiklutinum sum týðandi starvsfólk
- Lær at handfara truplar persónar og samrøður
- Ger arbeiðsdagin meira effektivan – fá skil á tíðartjóvunum og spar tíð




MÁLBÓLKUR

Øll, sum hava ábyrgd av viðlíkahaldi av fastognum, eitt nú húsavørðar, skúlatænarar, umsjónarfólk, starvsfólk á byggideildum og bygningsumsiting

Skeiðið er eitt samstarv millum Synergi & Confex

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - 322355 - 222355 - 227464

# “Øll vita, hvør húsavørðurin er, men eingin veit, hvat tú nágreiniliga kanst hjálpa við”

Kennir tú omanfyrinevnda aftur? Tað er heilt vist, at øll hava eina meining um, hvørjar uppgávur húsavørðurin ger, og hvat tú við tínum ábyrgdarøki skalt gera fyri tey. Men hvussu nógv síggja tað arbeiði, sum tú gert?

**Skeið við fokus á innanhýsis húsavarðatænastu**
Vit hava sett saman eitt skeið við fokus á júst tín gerandisdag: Tú fært tveir motiverandi og mennandi dagar, fyltir við nýggjum førleikum, orku og humor.

**Skeiðið gevur tær amboðini at:**

- **Gera arbeiðsdagin meira effektivan** – hoyr og lær, hvussu tú kann leggja sum mest í títt arbeiði, uttan at tað elvir til meira strongd. Her er nógv at læra frá m.a. ítróttinum.

- **Styrkja samstarvið og tænastuna** – tú lærir, hvussu tú verður meira tikin við í tí, sum hendir á tínum arbeiðsplássi, og hvussu tú sjónligger tíni arbeiðsøki og teg sjálvan sum starvsfólk. Tú lærir eisini meira um tænastu og um, hvussu tú fer við øðrum á virðiligan hátt.

- **Arbeiða meira effektivt við telduni** – her fært tú eitt snarskeið í at arbeiða meira effektivt og professionelt í Excel og Word. Mong verða bilsin av, hvussu nógv tey kunnu læra í heilt stutta tíð.

- **Seta mark og handfara truplar persónar** – sum húsavørður ella starvsfólk í eitt nú byggideildini hendir tað, at tú kemur í støður við ósemjum. Her lærir tú, hvussu tú tekur tær av truplum persónum og hvussu tú loysir ósemjur.

**Melda teg til nú á www.synergi.fo - og fá avsláttur!**
Finn tveir starvsfelagar og meldið tykkum til saman á www.synergi.fo – so fáa tit 10% avsláttur.

Teknar tú teg áðrenn 1. oktober 2010 sparir tú heilar kr. 1.000.

Hevur tú spurningar til skeiðið ella annað, ert tú vællkomin at venda tær til okkum á tlf. 322355 ella um t-post á synergi@synergi.fo.

Vit gleða okkum at bjóða tær til eitt gevandi skeið við nógvum íblástri.

Blíðar heilsanir
Synergi
Ása og Annika

## ONNUR TILTØK HJÁ SYNERGI

- 16. sept. At leiða onnur uttan at vera leiðari,
- 28. sept. Økonomi fyri ikki-økonomar, 2 dagar
- 23. sept. Excel 1 - tey fyrstu fetini, 2 dagar
- 30. sept. Framløguteknikkur, 1 dagur
- 04. okt. Professionelt nevndararbeiði, 2 dagar
- 06. okt. Útbúgving fyri samskiparar, skrivarar
  6. oktober 2010 - 7. apríl 2011
- 08. okt. Soleiðis handfer tú trupul fólk, 1 dag
- 23. okt. OUTLET 2010 - kom og rudda goymsl
- 11. nov. Starvsfólkahondbókin, 1 dag

**Hava tit tørv á einum skeiði innanhýsis á tykkara arbeiðsplássi** ella einum spennandi degi ella tíma við kompetentum fyrilestrarhaldarum?
Setið tykkum í samband við Ásu ella Anniku á tel. 322 355 og hoyr nærri, hvat vit hava at bjóða.

# SKRÁ

## DAGUR 1 - 17. november 2010

08.00 Skráseting og morgunbreyð við kaffi/te

08.30 Vælkomin v/Synergi

08.35 **Hvørjar eru avbjóðingarnar fyri framtiðar húsavarðartænastum?**

- Hvat verður størsta avbjóðingin hjá tær í framtíðini?
- Hvørji krøv verða sett tær?
- Hvussu fyrireikar tú teg í arbeiðnum at taka móti framtíðar avbjóðingum?

### Ger arbeiðsdagin meira effektivan

- Lær, hvussu tú raðfestir tað mest týðandi fyrst
- Skil fortreytirnar fyri at virka optimalt í starvinum
- Nær ert tú mest effektiv/-ur? Og hvussu brúkar tú ta vitanina til at fáa enda á uppgávunum?
- Soleiðis brúkar tú títt egna tilfeingi – lær, hvussu tú kann spara orkuna til tær krevjandi uppgávurnar

### Menn starvið – soleiðis skapar tú eitt betri samstarv við hini í fyritøkuni.

- Soleiðis arbeiðir tú við fleiri ymiskum leiðarum og persónum, sum allir vilja siga tær, hvussu tú skalt gera?
- Hvussu tryggjar tú tær at onnur hava fatan fyri og innlit í tað, sum er títt arbeiði?
- Soleiðis handfer tú, at øll vilja siga tær, hvussu tú skalt gera títt arbeiði og eingin sær, hvussu tað sær út frá tínari síðu.
- Ymiskir hættir hvussu tú kanst vísa á, at títt arbeiði er ein týðandi partur av arbeiðinum í fyritøkuni/stovninum.
- Soleiðis kemur tú ígjøgnum til leiðarar, sum ikki duga at síggja mest týðiliga tørvin á viðlíkahaldi
- Samstarv uppeftir og til grannan: Soleiðis fært tú størri álit og góðvilja frá leiðsluni.
- Hvat kann tú sjálv/-ur gera fyri at gerast ynskt/-ur og væl lýdd/-ur samstarvsfelagi?

### Tín leiklutur sum tænastupersónur

- Hvat er góð tænasta?
- Hvussu livir tú upp til høg tænastu- og dygdarkrøv í eini meira og meira kroystari arbeiðsstøðu?
- Soleiðis heldur tú fokus á tænastu í rokaligum arbeiðsdøgum
- Fá at vita, hvussu tú skapar fatan fyri, at tú ikki altíð bara kann tveita tað frá tær, sum tú stendur við beint nú fyri at gera nakað annað
- Lær, hvussu tú skapar virðing og fatan fyri tínum raðfestingum

15.30 Fyrsti skeiðdagur endar

**Birger Norup** undirvísir allan tann fyrsta dagin. Birger gevur ein ótrúligan íblástur, hann er dugnaligur og eldhugaður, og hann gevur tær við vissu eina rúgvu av amboðum, sum tú kann brúka beinleiðis í tínum gerandisdegi. Hann hevur meira enn 12 ár verið ráðgevi og undirvíst í verkætlanarstýring, samskifti og handfaring av strongd.

2010

2 dagar

v.fl.,

una, 2 dagar

## DAGUR 2 - 18. november 1010

08.30 Morgunbreyð við kaffi/te

09.00

### Lær at brúka funkurnar í Word betri – snarskeið

- Fá gagnligar snarvegir, soleiðis at tú arbeiðir skjótari
- Lær, hvussu ymsu forrtitini arbeiða saman
- Brøv, spjaldur og t-postar til fleiri fólk
- Fá skjót og smart prei, sum gera arbeiði hjá tær lættari

### Work Smarter í Excel – snarskeið

- Soleiðis gagnnýtir tú Excel einfalt og lætt
- Ger managongdirnar í Excel meira effektivar við t.d. formlum og formateringum
- Lær, hvussu tú brúkar listar og sorteringsfunkur í Excel

Undirvísari: Dánial á Dul Jacobsen

### Soleiðis handfer tú truplar støður, samrøður og persónar

Ymiskar persónsmenskur – hvussu hugsa tær og hvussu eru tær andlit til andlits

- Hvat er tað, sum ger, at summi fólk verða uppfatað sum trupul
- Einfaldir, men virknir hættir at handfara ymisk sløg av truplum fólkum
- Nýt rætta háttin at tosa – alt eftir persóninum, sum tú tosar við

### Grundskeið í motivatión og stuttleika í starvinum

- Arbeiðsgleði: Hvussu skapar tú eitt arbeiðsumhvørvi, har tú trívist og har tú kanst menna teg?
- Fest í neistan: Soleiðis motiverar tú teg sjálvan og tínar starvsfelagar
- Amboð at skapa stuttleika
- Lær hættirnar at fáa ein eitt sindur stuttligari gerandisdag

Undirvísari: Poul Jákup Thomsen

16.00 Takk fyri í dag

Skeiðið er grundað á tína virknu luttøku og skiftir millum undirvísing og samrøðu (dialog)

TÍÐIR Á SKEIÐSDØGUNUM

| | |
|---|---|
| Morgunbreyð og skráseting | kl. 08.30 |
| Undirvísing byrjar | kl. 09.00 |
| Døgurði | kl. 12.00 - 13.00 |
| Undirvísing endar dag 1 | kl. 15.30 |
| Undirvísing endar dag 2 | kl. 16.00 |

Harumframt steðgir við onkrum leskiligum fyrrapart og seinnapart

# TAÐ PRAKTISKA

**Dagur:** 17. & 18. november 2010
**Kostnaður:** kr. 6.999,- + mvg. pr. luttakara.
**NB!** **Sami kostnaður sum í DK**
**Íroknað:** Skeið, skeiðtilfar, morgunmatur, frokost og kaffi í steðgunum
**Tilmelding:** á www.synergi.fo
**Freist:** 1. november 2010
**Avsláttur:** **Tekna teg áðrenn 1. oktober og spar kr. 1.000**
Tekna tit 3 samstundis, fáa tit 10% avsláttur.

**Treytir fyri frámelding**
Møgulig frámelding skal verða skrivlig og hon skal stílast til Synergi og sendast til synergi@synergi.fo, ella faxast til 322 329.

Við frámelding verður roknað umsitingargjald á 10% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding – tó í minsta lagi kr. 500,-.

Kemur frámeldingin seinni enn 30 dagar fyri skeiðsbyrjan verður roknað eitt gjald uppá 50% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding. 21 dagar (ella seinni) fyri skeiðsbyrjan verður eingin afturgjalding. Um tær ikki ber til at vera við, so ert tú sjálvandi vælkomin at lata plássið til ein starvsfelaga.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og møguligum broytingum í skránni.

Avsláttir kunnu ikki kombinerast.

Hesin faldari er ein svana-merktur prentlutur.

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705